

# Føroyskt

## Sexologurin hevur eina missión: Føroyingar skulu tosa opið um sex! Elin í Stórustovu lyftir tungu føroysku dýnurnar uppfrá á nýggjari heimasíðu við eggjandi íblástri um sex, leikur og vælveru

*"Sum var tað ein jarðskjálvti, ið fór ígjøgnum meg, fekk hann meg at koma sum ongantíð fyrr!! Eg sá túsund litir framman fyri mær, hóast eg blundaði. Bleiv heilt svimbul, og pulsurin var í topp! Hann koyrdi á og kom við einum rópi av greði og nøgdsemi! Hann gav mær ein ordiligan smekk í endan og tivaði sum eitt ørt…"*

Brotið omanfyri er úr søguni "Tann ókendi". Hon er um eina kvinnu, sum steðgar upp í bilinum seint á kvøldi. Ein fremmandur steðgar og hjálpir. Afturfyri tekur hann hana hart og krevjandi aftanífrá á myrka førarasetrinum. Á føroyskum!

Nýskrivaðar erotiskar søgur er bara ein partur av tí, sum nýggja heimasíðan elin.fo hevur at bjóða.

Elin í Stórustovu, sexologur, sum flest øll kenna frá ungdómssendingum í útvarpinum, hevur tikið stig til síðuna, sum er um sex, vælveru, leikur og parlag.

– Endamálið er at fáa føroyingar, og serliga kvinnurnar, at kenna og menna seg sexuelt. At leiðbeina fólki til eitt betri sexlív, bæði við hvørjum øðrum og einsamøll, fortelur Elin í Stórustovu, sum hevur nomið sær útbúgving sum sexologur og parráðgevi hjá navnframa danska sexologinum, Joan Ørting.

### Krydd sum kitlar

Eitt eyðkenni við síðuni er parturin um sexleikur. Sambært Elini í Stórustovu kunnu sexleikur hava stóran týdning fyri parlagið sum heild, og serstakliga fyri kvinnurnar, sum ynskja at finna inn til sín veruliga sexualitet.

– Mannfólk, sum onki kenna til sexleikur, føla seg ofta hóttar av sexleikum. Teir halda, at eftirgjørdu lutirnir koma í staðin fyri teirra egnu livandi amboð. Men veruleikanum eru tær bert eitt eyka krydd, sum ger, at kvinnan fær meira burtur úr, sigur Elin í Stórustovu.

### Týskir snillar

Hon greiðir frá, at nógvar kvinnur lata sær lynda við vánaligt sex, tí tær hava lært at vera fittar og skikkiligar og tær skamma seg um sexualitetin.

– Og tað er synd, tí við at arbeiða eitt sindur miðvíst við at læra seg sjálvar at kenna kropsliga, ber til at blóma kynsliga, sigur Elin í Stórustovu.

Hon fegnast almikið um, at tað í dag eru kvinnur, sum framleiða og designa sexleikur í einum femininum sniði, sum kvinnurnar kenna seg sjálvar aftur í.

– Nútímans leikur eru nógv elegantari enn tær gomlu, sum mannfólkini komu dragsandi heim við av Istedgade – sovorðnir risastórir kjøtfarvaðir týskir plastikkmurtar við æðrum og hárum á bollunum. Totalt tørn of fyri kvinnuna, sigur hon og flennir.

### Opnar ungar kvinnur

Sum skilst hevur Elin í Stóxrustovu alt gott at bera sexleikum, sum hon eisini hevur við til fyrilestrarnar, sum hon heldur kring landið. Tá hevur hon eitt stórt arsenal av leikum, sum hon setur fram á borðið at vísa áhoyrarunum.

– Kvinnurnar eru sera opnar og positivar, tá tær hoyra um og sleppa at síggja hesar ymisku leikurnar. Eg havi ikki upplivað, at tær verða illa við. Tvørturímóti eru tær yvirraskaðar av sniðinum og litunum, sum leikurnar eru úr í dag, sigur Elin, og staðfestir, at tey ungu eru nógv fríari enn tey tilkomnu, tá tað ræður um sexleikur.

Eitt nú vísir hon á, at sexleikur eru púra natúrligar hjá teimum ungu